Vinnupolitikkurin ein skandala seinastu árini

Tjóðveldisflokkurin ásannar nú, at tað var eitt stórt mistak at lata fólkaflokkurin sleppa at umsita vinnumál í undanfarnu samgongu

VINNUPOLITIKKUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Vinnupolitikkurin hevur rætt og slætt verið ein skandala seinastu árini.

Hesa niðurstøðu er tjóðveldisflokkurin komin til, nú hann aftur situr í andstøðu, eftir at hava verið í samgongu seinastu seks árini.

Á flokstingi tjóðveldisfloksins í Sumba farna vikuskiftið var Høgni Hoydal komin til ta niðurstøðu, at vinnupolitikkurin hjá undanfarnu samgongu var fullkomiligamiseydnaður.

– Alivinnan er lorkað burtur av politiskum ósketni, og ongin verulig roynd hevur verið gjørd at seta í verk ein greiðan og visjóneran vinnupolitikk, segði formaður tjóðveldisfloksins.

– Tað var eitt stórt mistak at lata fólkaflokkin umsita vinnupolitikkin seinastu 6 árini, tað mugu vit ásanna, legði hann afturat.

Tjóðveldisflokkurin offraði vinnupolitikkin á fullveldisaltarinum, sigur Heini O.Heinesen

Vinnupolitikkurin offraður

Hesum var gamli og royndi politikarin, Heini O. Heinesen, púra samdur í.

Men hetta er ikki annað enn, hvat hann hevur ført fra øll árini, segði hann.

– Veruleikin er, at vinnupolitikkurin varð offraður á fullveldisaltaraninum ímeðan vit sótu í samgongu. Og nú verður hann offraður á sambandsaltarinum, legði hann afturat.

Hann segði tað skuldi tíverri skuldi so sterkur lútur til sum at Føroyar fóru á heysin, áðrenn vit funnu útav at leggja fiskivinnuna so til rættis, at tað bar til at fiska.

Hann vísti á, at støðan í fiskivinnuni í dag er tann sama, sum hon var fyri 20 árum síðani.

– Tað er ikki nakað nýtt fyribrigdi, at tað ikki loysir seg at fiska upsa. Tað hevur altíð gingið upp og niður og tað loysti seg heldur ikki at fiska upsa fyri 20 árum síðani. Men tá var onki Kina at skylda uppá.

Men hann ávaraði ímóti gongdini í dag

– Vit eru ongantíð í so stórum vanda sum nú fyri at endurtaka øll mistøkini, vit gjørdu í áttatiárunum, tí danski blokkstuðulin hevur gjørt, at vit hava fingið ein fiskiflota, sum als ikki stendur mát við teir fiskastovnar, vit hava.

Hann sipaði til samanleggingar av fiskiloyvum tvørturum bólkar og at veiðitrýstið er so nógv økt.

Vinnupolitikkurin í dag onki broyttur, tí hann gongur enn út uppá at drena almennan pening út í vinnuna.

Hann helt eisini, at Løgtingið var ov veikt, tí har tordi ongin at føra ein politikk, sum gongur fjøldini ímóti

– Har eru valfundir hvønn dag, legði hann afturat.

Hann helt at tað var neyðugt at arbeiða við vinnuni alla tíðina.

– Lógararbeiðið er ikki nakað, sum verður liðugt. Tað er sum at arbeiða í einum grótbroti, tað verður ongantíð liðugt, segði Heini O.Heinesen.

Vit fingu ikki orðið á Bjarna Djurholm áðrenn blaðið fór til prentingar.

Havnarfólk og kvinnurnar í Klaksvík samráðast saman

Tað er nú greitt, at øll arbeiðarafeløgini fara at samráðast saman, nú samráðingar skulu vera um nýggjan sáttmála

SAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað er nú greitt, at øll tey fýra arbeiðarafeløgini, sum hava sagt sáttmálarnar upp, fara at samráðast við arbeiðsgevararnar um um nýggjan sáttmála í felag .
Tað er greitt nú í vikuni.

Tað hevur leingi verið greitt, at Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag fóru at samráðast saman, men tað hevur drigið út at fáa Havnar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag at taka støðu.

Men tað hava tey bæði feløgini nú gjørt og úrslitið er, at øll fýra feløgini fara at samráðast saman.

Tað vátta bæði Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðsmannafelag og Hanna Isaksen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Eitt arbeiðarafelag er í landinum afturat. Tað er Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, men menninir í Klaksvík hava gjørt av, ikki at siga sáttmálan upp.

Feløgini vilja onki siga um, hvørji krøv fara at verða sett til arbeiðsgevarar.

Men bæði Ingeborg Vinther og formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag hava fyrr boðað frá í Sosialinum, at væntandi, fara tey at krevja meiri í løn, umframt aðrar ábøtur á sáttmálan. Ingeborg Vinther sigur at tað er tað besta at feløgini samráðast saman og at feløgini nú fara at gera eitt upplegg til samráðingarnar.

Fara til gongu í Hvalba í dag

Í kvøld verður skipað fyri gonguferð runt í Hvalba

Í kvøld skipar Kunningarstovan á Tvøroyri fyri gonguferð í Hvalba.

Kunningarstovan á Tvøroyri ætlar at gera gonguferðir til fastan tátt á skránni hvørt hóskvøld Síðsta hósdag skipaðu Kunningarstovan á Tvøroyri fyri gonguferð runt á Tvøroyri, har nøkur fólk vóru við og tá varð borið upp á mál at fara til Hvalbiar í dag.

Tey siga, at tey, sum eru rakt av nýggjasta mótaherðindi á økinum, sum er at ganga við skíðstavum, eru vælkomin at hava teir við.

Men tey, sum ongar stavir eiga, skulu endiliga ikki halda seg aftur, tí hetta er eitt tiltak fyri øll.

Í kvøld er ætlanin at hittast við Kirkjugarðin í Leirbøi í Hvalba klokkan 19 og síðani verður farið ein túr runt í bygdini.

Suðuroyingar hugaðir fyri at samstarva meir

Fríggjakvøldið hittust borgarstjórarnir í Suðuroy á fundi at tosa um tættari samstarv

SAMSTARV
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Borgarstjórarnir í teimum sjey kommununum í Suðuroy eru sinnaðir at samstarva meir.

Tað er niðurstøðan eftir ein fund ímillum borgarstjórarnar í Suðuroy Fríggjakvøldið.

Tað var Tvøroyrar Býráð, sum kallaði borgarstjórarnar í hinum seks kommununum í Suðuroy á fund.

Á fundinum skuldu borgarstjórarnir umrøða møguleikan fyri at endurstovna felags kommunanala felagsskapin, sum var í Suðuroy fyri einum 15 árum síðani.

Kristin Michelsen sigur, at tað er stórur áhugi fyri at endurskipa felagskommununa í Suðuroy

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað vísti seg at allir borgarstjórarnir eru sinnaðir at endurstovna felagskommununa.

Nú fer so hvør borgarstjóri at leggja málið fyri sítt bý- ella bygdaráð, sum nú skulu taka støðu til málið.

Ætlanin við hesi felagskommununi er at allar kommunurnar í Suðuroy skulu samstarva og draga eina línu mótvegis myndugleikum í Havn, tá ið mál av felags áhuga eru til viðgerðar.

Felagskommuna var í Suðuroy fyri einum 15 árum síðani, men tað datt niðurfyri. fyri nøkrum árum síðani royndi Tvøroyrar Kommuna at endurskipa samstarvið, men tá var ongin áhugi fyri tí í Vágs Býráði, so tann royndin datt niðurfyri.

Men nú roynir Tvøroyrar Býráð so einaferð afturat og hesuferð tykist um um at áhugin er størri.

Felags barnavernd fyri alla Suðuroynna

Tað er nú okkurt, sum bendir á, at øll Suðuroy verður skipað í eitt felags barnaverndarøki

BARNAVERND
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Nú verður kanska øll Suðuroy skipa í eitt barnaverndarøki.

Tað eru ábendingar um eftir at allir borgarstjórarnir í Suðuroy hittust á fundi fríggjakvøldið at tosa um nærri samstarv ímillum tær sjey kommunurnar í Suðuroy.

Eitt av teimum málum, sum varð umrøtt, var, hvussu Suðuroyggin skal skipast í barnaverndarøki.

Nýggja lógin um barnaverndir sigur, at tað skulu minst 1500 fólk búgva í hvørjum barnaverndarøki.

Útfrá hesum hevur Vágs Kommuna tikið stig til at leggja syðru helvt í Suðuroy í eitt barnaverndarøki , sum skal umfata Sumbiar-Vágs- Porkeris- og Hovs Kommuna.

Kristin Michelsen sigur, at á borgarstjórafundinum fríggjakvøldið boðaðu tær smáu kommunurnar í sðyru helvt, altso Sumbiar-, Porkeris- og Hovs Kommuna frá, at tær vildu heldur hava eina barnavernd fyri alla Suðuroy.

Sum skilst eru aðrar kommunur í Suðuroy eisini meiri sinnaðar fyri tí.

Hetta gevur Vágs Kommunu ein trupulleika, tí tað búgva ikki 1500 fólk í Vági. Sostatt má Vágs Kommuna verða við í hesum samstarvinum, antin tað so verður við góðum vilja, ella ikki.

Nú skal so Vágs Kommuna viðgera málið av nýggjum.

Tað skulu minst tríggir limir sita í eini komandi barnavernd.